# OD fer at hjálpa fátækasta landinum

**Í vikuskiftinum varð avgjørt, at hjálparfelagsskapurin Operatión Dagsverk komandi ár skal hjálpa Niger, ið er heimsins fátækasta land**

HJÁLP
*Annika Hedegaard Isfeldt*
*annika@sosialurin.fo*



Hvørt ár møtast OD-bólkarnir kring Danmark og Føroyar á einum skúla til "Stórmøti". Her er kjak um lógirnar hjá OD og um hvussu OD kann gerast betri komandi árið. Størsta málið á fundinum er at avgera hvørjum landi, felagsskapurin skal hjálpa komandi ár.

Ymiskir lítlir hjálparfelagsskapir hava seinastu mánaðirnar sent verkætlanaruppskot teirra inn til OD-Sekretariatið í Keypmannahavn, har tey meta um, hvørji uppskot røkka krøvunum hjá OD. Tey uppskotini, ið sjálvbodnu starvsfólkini á Sekretariatinum halda vera tey best egnaði, verða síðani løgd fram fyri OD-bólkunum á "Stórmøtinum". Verkætlanirnar, sum vóru lagdar fram um vikuskiftið vóru ávíkavíst India, Zimbabwe, Brasil, Niger og Afganistan.

## Landið, har øll onnur hava mist vónirnar

Sunnudagin samtyktu 3 næmingar á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði saman við donsku OD-bólkunum eftir fleiri atkvøðuumførum at stuðla fátækasta landinum í heiminum, vesturafrikanska Niger. Hóast hetta landið er heimsins fátækasta fátækasta land, er tað eisini tað landið, ið fær minsta menningarstuðulin.

- Tað er feitt, at vit tora at stuðla einum landi, har øll onnur hava mist vónirnar, sigur Bodil Signe Wedele frá Operation Dagsverk nevndini. – Tað er ein røtt OD-verkætlan, sum nýtir undirvísing sum hjálp úr fátækradóminum. Vit rokna við, at hetta fer at loysa seg í Niger, tí verkætlanin hjá okkum tekur útgangsstøði í lokalu umstøðunum.

85% av fólkunum í Niger duga hvørki at lesa ella skriva. Gentir og lítlir etniskir bólkar eru sjáldsamar gestir í skúlunum. Verkætlanin vil tí gera ein skúla, har øll hava møguleika fyri at verða undirvíst. Gentirnar skulu oftast vera heima fyri at hjálpa mammuni, men við m.a. at lána foreldrunum eitt asni, vónar OD, at fleiri gentir fáa møguleika fyri at nema sær eina útbúgving og harvið fáa møguleika fyri at fáa eina betri framtíð. Kanska kann júst henda OD-verkætlanin eisini varpa ljós á ringu umstøðurnar í landinum og sostatt gera, at onnur eisini síggja, hvussu týdningarmikið tað er at stuðla her.

## Stór undirtøka í ár

Í ár hevði OD-verkætlanin við at hjálpa guaraní-indiánarunum, sum eru skuldartrælir, til at fáa ein møguleika fyri at nema sær eina útbúgving og henda var sera væleydnað – serliga í Føroyum. Tilsamans megnaði OD at savna 7,3 milliónir inn, harav Studentaskúlin í Hoydølum forvann 150.150 kr. Hetta er størsta upphæddin, skúlin nakrantíð hevur savnað inn til OD og sum tað sær út nú, vóru næmingarnir í Hoydølum teir, ið savnaði næstmest inn í øllum OD! Hetta sigur OD-bólkurin seg vera sera væl nøgdan við. – At verkætlanin eydnaðist so væl í ár, eru vit øll sera fegin um, sigur eitt umboð úr bólkinum. – Sum tað sær út nú, hevur stóri studentaskúlin Christianshavns Gymnasium savnað umleið 400 kr. meira inn enn vit, so munurin var ikki stórur. Hetta ger eisini, at hugurin verður størri og man fær hug at gera uppaftur meira við at víðka um OD komandi ár, tá ið vit fara undir at hjálpa Niger.

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

***Hjálparfólki til breyðsøludeildina***

at byrja skjótast til ber

Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.

Arbeiðsuppgávur:

At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.

Arbeiðstíð:

Um 25-30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn leygardag fyrrapart

Vit rokna við, at tú ert:
· Røkin
· Blíðlíg/ur av lyndi
· Álítandi
· Fleksibul
· Trívist væl við nógvum og fjølbroytum uppgávum

Løn:
Smbrt. S & K sáttmálanum

Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bo Møller
Fartel 217593

fk

**Eftirløn er einki at bíða við**

Tað er lætt at rokna, hvat tú fært útgoldið í eftirløn. Setur tú null inn, fært tú null út. Men stovnar tú eftirløn í dag, fært tú hægstu innlánsrentu bankans, skattavinning og at enda eitt stórt útgjald, tá tú ert vorðin 60.

Á foroya.fo kanst tú rokna tína eftirløn. Tosa við okkum, og vit hjálpa tær at finna rætta inngjaldið og bestu møguleikarnar fyri størri avkasti. Eftirløn er einki at bíða við.

0
+0
=0

REPROZ

FØROYABANKI